VEGLEIÐING UM

# HÚSARHALDS-BURTURKAST



IRF



Vitja www.irf.fo og fá meira at vita um tænasturnar hjá IRF.
Vilt tú hava góð ráð um endurnýtslu og skiljing, ert tú vælkomin at fylgja irf_fo á Instagram og Facebook.

# Góði borgari

**Tað er sera týdningarmikið, at vit øll læra okkum at skilja okkara burturkast. Tess betur burturkastið verður skilt, tess meira fáa vit sent til endurvinningar heldur enn at brenna ella tyrva tað.**

IRF hevur sett sær sum langtíðarmál, at í 2030 skal 50% av øllum burturkastinum endurvinnast. Í dag endurvinna vit á leið 30%, so tað er eitt framsøkið mál, men væl gjørligt, um borgarar, vinnulív og politikkarar lyfta uppgávuna í felag.

Hóast føroysk húsarhald enn ikki hava eins nógvar skilji-møguleikar við hús sum húsarhaldini í grannalondum okkara, kunnu nógv av okkum longu nú skilja nógv meira, enn vit gera í dag.

Hesin faldari er ein vegleiðing um, hvussu tú best skilir burturkastið við hús – í hvíta, reyða og gráa posan og til kommunala endurvinningarplássið.

Tað ger alstóran mun at skilja burturkast rætt við hús. Her skapa vit rætta hugburðin, sum vit taka við okkum til arbeiðis, í skúla o.s.fr. Soleiðis flyta vit okkum sum samfelag frameftir á grønu kósini.

Ábyrgdina fyri umhvørvinum eiga vit øll. Saman gera vit stóran mun.

Vinaliga

IRF

# Nær fái eg nýggjar posar?

Í mars og september ber IRF posar út. Hvørja ferð fært tú 28 gráar posar, og hetta strekkir til, at IRF heintar ein gráan posa um vikuna, umframt at tú hevur tveir eykaposar til hvørt hálvár. Í mars fært tú eitt rull við hvítum posum, sum skal røkka til eitt ár. Hevur tú tørv á fleiri hvítum posum, kanst tú boða frá á **koyrideildin@irf.fo**

Eru tit seks fólk ella fleiri í húsi, hevur tú rætt til fleiri posar. Eru fleiri enn eitt húski í húsinum, hava tit eisini rætt til fleiri posar. Teir fært tú við at boða kommununi frá. Mangla posar, áðrenn nýggir verða bornir út, kanst tú keypa eykarull í ávísum handlum kring landið. Á **irf.fo** sært tú, hvar IRF-posar fáast til keyps. Ruskbilurin heintar bert posar frá IRF, ikki aðrar posar.

Tá ið reyði posi verður tikin, verður ein nýggjur lagdur í staðin. Hevur tú ongan reyðan posa, boða frá á **koyrideildin@irf.fo**

# Skiljiskjáttan

Í skiljiskjáttuni sært tú, hvussu tú skilir burturkastið rætt. Brúka leititeigin fyri lættari at finna tað, tú leitar eftir.

Tað er jú skilagott at skilja.

Lætt at skilja rætt við skiljiskjáttuni á **www.irf.fo/skiljiskjattan**



# Glas

Allar glasfløskur, drekkigløs og glaskrukkur kunnu latast inn til endurvinningar. Bæði klárt og litað glas kann latast inn. Glaslutir skulu vera tómir og skolaðir við vatni. Ikki er neyðugt at nýta sápu. Etikettir kunnu vera á, og sama kunnu lok og proppar úr plasti, korki og metali.

GG: Kanna eftir, um títt kommunala endurvinningarpláss tekur ímóti glasi.

**Ja takk ✓**

- Glasfløskur
- Drekkigløs
- Glaskrukkur

**Nei takk ✗**

- Steintoy
- Postalín, keramikkur, eldføst føt
- Grýtulok úr glasi
- Ljósperur
- Spegl og vindeygagløs
- Holnálir (kanylir)

# Metal

Mettallutir kunnu latast inn á kommunalu endurvinningar-plássini kring landið. Metalíløt (blikk og dósir) skulu vera tóm og skolað við vatni. Ikki er neyðugt at nýta sápu.

GG: Kanna eftir, um títt kommunala endurvinningarpláss tekur ímóti jarni.

**Ja takk ✓**

- Blikk
- Grýtur og pannur
- Bestikk
- Seymir og skrúvur
- Aluminiumsblikk uttan pant

**Nei takk ✗**

- Spreydósir
- Battarí
- Gassfløskur

# Reyði posin

**Reyði posin er einans til serburturkast.**

Serburturkast er t.d. øll sløg av battaríum (latast í krukku við loki), ljósperur, smærri ljósrør, smærri elektroniskir lutir (fartelefonir, teldlar, løðarar, roykávararar, leikur og káplar), øll kemikaliu (lútur, sýra, loysingarevni og sterk sápa) og allir spreydunkar (fullir og tómir), t.d. hársprey, rómasprey, spreymáling o.s.fr.

## Heinting

Tá ið tú skalt lata reyða posa inn, setur tú hann við ruskstativið tann dagin, grái posi verður heintaður. So verður reyði posin tikin, og tú fært ein nýggjan í staðin. Eisini ber til at lata reyða posan inn á kommunala endurvinningarplássið. Minst til at binda fyri reyða posan, so einki fer úr honum.

Um tú ongan reyðan posa hevur, kanst tú boða IRF frá á **koyrideildin@irf.fo**, so fært tú ein reyðan posa, næstu ferð grái posi verður heintaður.

## Ja takk ✓

- Battarí í krukku við loki
- Amboðsbattarí
- Ljósperur og ljósketur
- Elektronikkur, fartelefonir, teldlar, teldur og løðarar
- Leidningar
- Kemikaliu
- Spreydósir

## Nei takk ✗

- Fýrverk (kommunala plássið)
- Hvassir lutir (kommunala plássið)
- Heilivágur (apotekið)
- Holnálir, sproytur og insulinpennar (í nálaspann til apotekið)


Rexona
MotionSense
Chantilly
Klorin
ORIGINAL
DURACELL
SIMPLY
RED STINGER
NIKKO R C SYSTEMS
FULL FUNCTION
27MHz
Reyður posi
Serliga dálkandi burturkast
MÁLING
Allar leivdir av máling, lakki,
træverju, limi o.t.
LOYSINGAREVNI
Allar leivdir av terpentini, spritti,
bensini og tynnarum av øllum slag.
SYRA OG LÚTUR
kaustiskari sodu og tílíkum.
LJÓSKELDUR
Halogenperur, lágorkuperur, ljósrør
og kyksilvurlampur skulu vera
pakkaði væl inn.
AMBOÐ OG LEIKU
Smærri el-drivin ella battaridrivin
amboð, telefonir ella leiku.
BATTARÍ

# Hvíti posin

**Hvíti posin er einans til reint papp, pappír og bleytt plast.**

Reint papp og pappír kann t.d. vera tíðarrit og prentað bløð, lýsingar (tak plastposan av fyrst), smáeskjur (t.d. frá heilivági og smyrsli), brævbjálvar (við og uttan rút), skógvaeskjur, papprullur, bøkur, reinir eggjabakkar og reinar pitsaeskjur. Reint papp er ikki jogurtpakkar, djúspakkar og mjólkarpakkar.

Bleytt plast er plast, sum er so bleytt, at tú kanst binda ein knút við tí. Plastið kann vera klárt og litað, og tað kann hava prent á. Tað má ikki vera dálkað av feitti, mati, máling ella tílíkum. Tú kanst samla bleyta plastið í ein kláran posa og leggja í hvíta posan ella lata tað inn á kommunala endurvinningarplássið.

## Heinting

Í Sandoynni og í Suðuroy verður hvíti posin heintaður fjórðu hvørja viku. Aðrastaðni verður hann heintaður, tá ið hann verður settur út til ruskstativið ella – um stativ er til posan – tá ið hann er fullur. Hvíti posin verður ikki heintaður, um nakað annað enn reint pappír, papp og bleytt plast er í honum. Sí meira á **www.irf.fo.**

### Ja takk ✓

- Alt reint papp/pappír
- Tíðarrit og bøkur
- Lýsingar (tak plastposan av fyrst)
- Smáeskjur (t.d. frá heilivági, smyrsli) og skógvaeskjur
- Brævbjálvar (við og uttan rút)
- Reinar pitsaeskjur og eggjabakkar
- Vanligt gávupappír
- Bleytt plast samlað í ein kláran posa

### Nei takk ✗

- Skitið ella vátt pappír/eskjur
- Papp við nógvari máling á
- Mjólkarpakkar, djús- og jogurtpakkar
- Dálkaðir eggjabakkar
- Dálkaðar pitsaeskjur
- Dálkað matinnpakking
- Folio-gávupappír og gávubond
- Hart plast

## Les meira ...

um bleytt plast á **irf.fo/skiljiskjattan**
Skanna kotuna og les meira.

















# Grái posin

**Grái posin er einans til restburturkast.**

Restburturkast er alt tað, sum ikki skal í hvíta posan, reyða posan ella á kommunala endurvinningarplássið. Hvassir lutir mugu pakkast sera væl inn, áðrenn teir verða latnir í posan.

## Heinting

Grái posin verður heintaður eina ferð um vikuna, treytað av at krøvini til gráa posa eru fylgd.

## Hvussu hevur tín grái posi tað?

Grái posin skal m.a. hava egið stativ, hann má ikki viga meira enn 20 kg, og so mást tú eisini minnast til at binda fyri allar teir smærru posarnar, sum tú letur í hann.

Hevur tú annars kannað, um tín grái posi livir upp til krøvini í dagførdu reglugerðini? Skanna QR-kotuna fyri at síggja krøvini.

### Ja takk ✓

– Skitið papp og pappír
– Blæur
– Hart plast (t.d. sápudunkar)
– Kaffiposar og kaffigrugg
– Matleivdir
– Mjólkarpakkar, djús- og jogurtpakkar

### Nei takk ✗

– Alt, sum skal í hvíta posa
– Alt, sum skal reyða posa
– Glas- og metallutir

**Visti tú...**

at tú kanst hava 9 skiljingar við hús?
Skanna kotuna og les meira.






















**Ja takk ✓**

– Piss
– Kukk
– Vesipappír

**Nei takk ✗**

– Bind
– Hár
– Hít
– Tampong
– Tanntráður
– Vattpinnur
– Vætulappi
– Vátserviettur

# Hvat kann skolast niður í vesið?

Einans vesipappír, piss og kukkur skal skolast niður í vesið. Alt annað skal í ruskílatið, tí tað tippir vesið, órógvar skipanina og dálkar umhvørvið.

Undir ongum umstøðum skal hetta skolast niður: Tanntráður, vætulappar, skúmklútar, einnýtisserviettar, vátserviettar, vattpinnar, hítir, bind, blæur, tampong og hár.

IRF miðar eftir at tøma allar rottangar í limakommununum regluliga.

**Les meira ...**

um rottangatøming á
www.irf.fo/rottangatoming/

IRF

**Tel. 41 42 43 · irf@irf.fo · www.irf.fo**